VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Færri aðalráð

Ein spurningur, sum hevur verið nakað frammi beint undan nýggja árinum er talið av aðalráðnum. Hetta er sjálvandi eitt mál, sum eigur at verða viðgjørt longu nú, tí hetta árið 2010 er ikki bara eitt nýtt ár men tað er eisini tað fyrsta í einum nýggjum ártíggju. Tvs. at vit hava bæði orsøk til og brúk fyri at seta hol á mál, ið vit ynskja skulu broytast kolveltandi komandi árini.

Føroyar telja bara unleið hálvthundrað túsund menniskju. Tí eiga viðurskiftini eisini at lagast út frá hesum fortreytum. Eisini spurningurin um talið á aðal- ella landsstýrisráðnum. Vit mugu veruliga fara í "tænkeboks" av nýggjum og gera upp við vanabundna hugsan og tillaga alla skipanina av aðalráðnum eftir tørvi og hvat vit hava ráð til.

Tey eru níggju í tali í dag, og talið hevur verið heilt niðri á seks. Tvs. heili trý aðalráð færri. Hvør er so orsøkin til, at tey eru vorðin so nógv í tali? Er tað arbeiðsbyrðan, sum er vorðin størri ella er tað rætt og slætt fyri at fáa politiskar kabalur at ganga upp! Sjálvandi er talan um bæði tvey, men politiska kabaluleggingin man vera høvuðsorsøkin til, at vit fingu so mong aðalráð.

Hóast ABC samgongan varð skipað við ikki færri enn 9 ráðum, so hava bæði løgmaður, fíggjarmálaráðharrin og nú eisini vinnumálaráðharrin mælt til at lækka talið av aðalráðum. Onkur hevur sett tal á. Seks aðalráð.

Eitt er teori, annað er praksis. Hvat kunnu vit so væntа? Neyvan er realistiskt at rokna við eini broyting í hesum valskeiðnum, men hví ikki brúka byrjanina av hesum ártíggju til at fyrireika at fækka talið á aðalráðnum. Hví ikki gera hetta til eitt felagsmál fyri allar flokkar: at uttan mun til hvør samgonga situr eftir komandi val, so skal talið av aðalráðnum lækkast, so tað hóskar til okkara veruleika. Í nýggjárssending í ÚF komu bæði stjórin á Hagstovuni og stjórin á Havsbrún inn á nettupp spurningin um aðalráð. Og har var svarið greitt: leggið fiskivinnu- og vinnumál saman og gevið júst hesum málsøki nógv størri fokus. Herman Oskarsson fór so langt sum at siga, at vinnumálini áttu at fingið nógv størri raðfesting enn eitt nú fíggjarmálini.

Hetta eru avgjørt áhugaverdir tankar. Tí tað er vinnulívið, sum er grundarlagið undir øllum, og tá stjórin á einum av landsins størstu vinnuvirkjum, Havsbrún sigur sítt virki verða slept nærum uppá fjall í almennu skipanini, tí tað hvørki hoyrir undir fiskivinnu- ella vinnumál, so er okkurt ravruskandi galið. Lat okkum taka úttalilsini í hesi frálíku ÚF sending til eftirtektar og taka tey við í moduleringini av eini heilt nýggjári skipan við aðalráðnum eftir komandi val. Tað kann annars virka heilt øvugt, tá vit hoyra formann Fólkafloksins vilja avmarka almenna forbrúkið samstundis sum hann sjálvur gongur á odda við at hækka hesar útreiðslur umboðandi ein hin størsta vøksturin í almennu skipanini, nevniliga uppbyggingina av einum uttanlandsráð, hvørs uppgávur í stóran mun kundu verið riknar av løgmansembætinum.

Sosialurin

Gevið okkum ta festligu nýggjárskonsertina aftur

BERGLJÓT MADSEN

Tað hevur altíð verið festligt at uppliva nýggjárskonsertina hjá Føroya Symfoniorkestri. Har var alt, musikkur, blómur, ballónir, glað menniskju. Tú sat væl og fylgdi øllum sum fór fram á pallinum. Og stemningurin var í topp, tú bleiv flutt inn í eina heita og glaða verð. Vit gleddu okkum til hesa ljómandi og vøkru løtuna saman við Føroya Symfoniorkestri.

Hesi seinnu árini hevur tað verið so, at stórur partur av billettunum og tey bestu plássini eru seld, áðrenn billett-sølan er byrjað. Tað er eitt sindur skuffandi hjá okkum, sum annars eru trúgvir áhoyrarar og stuðlar hjá Føroya Symfoniorkestri alt árið, at sita eftir við molunum. Eg giti, at tað munnu vera virkir við stórari keypiorku, sum soleiðis frammanundan sleppa at keypa billettir sum gávu til síni starvsfólk.

Haraftrat hevur konsertin, síðani konsertsalurin fekk flatt gólv og klingran bleiv tikin uppí rúmið, verið sum ein skuggi av sær sjálvum. Sjálvt um orkestrið spælir líka væl sum altíð, so er tann stóra upplivingin mestsum burtur, tá tú ikki kanst fylgja við tí, sum fer fram á pallinum, men bert hyggur inn í nakkan á teimum, sum sita frammanfyri tær. Eg havi mestsum hug at velja hesa ársins størstu konsertina frá.

Sjálvandi má eisini havast atlit til tað fíggjarliga, men man tað ikki bera til at hava tvær konsertir, nú øll manningin er samlað, ístaðin fyri at stúgva okkum saman á fløtum gólvi, ella lata okkum gjalda eitt sindur meira fyri billettina?

Góðu tit sum ráða fyri borgum: Gevið okkum ta festligu nýggjárskonsertina aftur.

Tá ið útvarp verður sum sjónvarp

WILLIAM SMITH

Yvirskriftin bendir kanska á, at sjónvarp tekur av útvarpi sum formidlari av upplivilsum. Undirskilt soleiðis, at sjónvarpið hevur fyrimunin av at lýsa søguna bæði í orðum og myndum. Vit fáa sjón fyri søgn. Útvarpið sigur bara søguna. Umhvørvið og umstøðurnar, søgan fer fram í, mást tú ímynda tær. Men tá ið útvarp er best, kveikir søgan í tínum huga myndir, ið taka av teimum neyvt tilkliptu myndunum, sum myndatólini fanga teg í. Soleiðis er sendirøðin 'Meg minnist' við Jógvani Ingvard Olsen. Og takk fái navnin, Jógvan Arge, ið førir siðaarvin eftir útvarpslegenduna Niels Juel Arge víðari.

Sjáldan, um nakratíð, havi eg hoyrt frásøgumann siga so livandi frá, at tú sjálvur livir við í søguni. Tú situr rúnabundin og lurtar. Her angar av hoyggi og torvi. Tú hoyrir súðin og meldurin í sjóvarmálanum og kennir brotasjógvin rykkja í skipsskrokkin. Tú ert umborð og kennir roykin í lugarinum og saltráman av stórhavinum. Jógvan Ingvard sigur frá, sum tá ið Hemingway er bestur. So livandi og einkult. Humorin liggur undir sum eitt fjálgt eygnabrá, og virðingin og tokkin til teirra, ið flokkast í søguni, eyðkennir søgumannin. Einki uppgjørt, einki hóvasták og sjálvur framburðurin kann best sammetast við málsligu perluna 'Feðgar á ferð' eftir Heðin Brú.

Lukkutíð at sjónvarpið ikki fekk hugskotið til at seta myndir á søguna hjá Jógvani Ingvard, áðrenn Jógvan Arge heitti á hann. Nú kunna vit gleða okkum til næstu bergtakandi, myndaríku útvarpssendingina – og endursendingarnar við.

Illur???

Sig tína meining í Sosialinum

Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.